## Tulipanir móti narko

**Lions Club:** Vikuna undan páskum fer felagsskapurin aftur at skipa fyri sonevnda Tulipan-tiltakinum hvørs herróp er “Nei til narko”.

Her fer at bera til at keypa sær eitt serstakt blómutyssi við tulipanum, har eitt skelti stendur við áskriftini “Nei til narko”.

Eitt slíkt blómutyssi við 10 tulipanum kostar 250 kr. Peningurin fer til framhaldandi upplýsing um rúsevni.

Lions-feløgini hava seinastu sjey árini skipað fyri sokallaðum Lions Quest-skeiðum fyri fólkaskúlalærarar. Hetta er í gjørt í samstarvi við Rúsdrekkaog Narkotikaráðið. Endamálið við hesum er at geva næmingum lívsvirði og sjálvsálit, so teir duga at siga nei til rúsevni.

**sb.**

## Missiónsfelagið fær nýggja skrivstovu

**Klaksvík:** Kirkjuliga Missiónsfelagið hevur nú fingið nýggja skrivstovu á Stangavegi í Klaksvík.

Missiónsfelagið hevur annars skrivstovuhølir í Missiónshúsinum við Landavegin í Havn. Men missiónsleiðari teirra, Øssur Kjølbro býr í Klaksvík, og tí hevur saknur verið á slíkum hølum í hansara heimbýi.

Í farna mánaði varð avtala gjørt við Com Data í Klaksvík um leigu av skrivstovuhølum til missiónsskrivaran og annað virksemi hjá felagnum.

Á sama staði verður eisini útgerð til teirra, sum seta upp blaðið hjá felagnum “Kirkjuligt Missiónsblað”.

**sb.**

# Royndir og nýggir bólkar hittast á konsert

**Leygarkvøldið verður aftur ein gospelkonsert á skránni. Hesaferð eru tað tey ungu innan Heimamissiónina sum skipa fyri**

GOSPEL

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Pauli Reinert Poulsen er ein av ungu, men royndu monnunum í bólkinum Proclaim. Hann verður eisini at hoyra leygarkvøldið*

**Fuglafjørður:** Leygarkvøldið verður ein gospelkonsert á skránni. Talan er um tað árligu HMU-konsertina, sum HeimamissiónsUngdómur skipar fyri.

Eins og í fjør verður konsertin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Í ár verða tríggir bólkar á skránni: Proclaim, VOX og ein bólkur úr Vágum.

### Fjølbroytni

Teir tríggir bólkarnir sum fara at spæla leygarkvøldið eru bæði kendir bólkar og ein heilt nýggjur bólkur.

Bólkurin Proclaim er mannaður úr Eysturoynni og Streymoynni. Teir ungu menninir í bólkinum hava gjørt rættiliga nógv vart við seg ta seinastu tíðina, við sínum sera fjølbroytta og vælsvingandi tónleiki.

VOX er rútmiskt gospelkór mannað við eysturoyingum. Kórið hevur eftirhondini fleiri ár á baki. Stílurin er alt frá stillum accapella til lívligan rútmiskan gospel.

Og so er tað tann nýggi bólkurin Abide, mannaður úr Vágum, sum mong helst síggja fram til at hoyra.

Tað er tó ikki bert tónleikur á skránni á konsertini. Millum framførslurnar verður ein andakt og videoklipp víst á stórskíggja.

## Býargartnari til tey grønu økini

**Fuglafjørður:** Nú skal eitt fólk setast at taka sær av teimum grønu økjunum í býnum og annars taka sær av viðlíkahaldi av fríøkjum.

Fuglafjarðar kommuna søkir í hesum døgum eftir býargartnara sum skal setast í starv nú í summar.

Uppgávurnar hjá hesum fólki verður í fyrsta umfari at hava dagligu leiðsluna á gartnaradeildini og um umsita nýgerð av fríøkjum og viðlíkahaldi av teimum. Viðkomandi skal eisini umsita kirkjugarðarnar í kommununi, spælipláss ini og leikvøllin og økið rundan um hann.

**sb.**

**Bólkaleiðari til Marknaðardeildina**

**Vit leita eftir tær...**



**Søkt verður eftir bólkaleiðara til Marknaðardeildina at byrja skjótast gjørligt**

Fyri at styrkja støðu bankans lýsa vit eftir einum dugnaligum og fyritaksomum bólkaleiðara, ið virkin vil luttaka í menningini av okkara produktum og andliti úteftir, so Føroya Banki framhaldandi verður fremsta val føroyinga.

Tú verður partur av einum ágrýtnum marknaðartoymi við tilvísing til leiðaran fyri privatkundaøki bankans. Talan er um eitt útvent arbeiði, har tú kemur í samband við nógv fólk innanhýsis og uttanhýsis. Tú kanst vænta eitt arbeiði í einum avbjóðandi umhvørvi, har stundum nógv er at gera.

**Arbeiðsøkið**
Málsetningurin fyri arbeiðsøkið er at stuðla leiðslu og starvsfólki í teirra arbeiði at varðveita og støðugt økja um virðið á produktum og profili bankans.

**Tínar uppgávur fara millum annað at fevna um:**
- Virkin at vera við í menningini av marknaðarstrategi bankans
- Menna, leggja til rættis og gjøgnumføra marknaðarátøk
- Vera við til at lýsa, tillaga og varðveita snið, tvs. bankans andlit úteftir
- Greina og gera frágreiðingar um gongdina viðvíkjandi produktum bankans fyri at koma við uppskotum um at menna verandi og nýggj produkt og tænastur
- Virkin at viðgera og avgreiða stuðulsumsóknir og standa fyri virksemi, sum er avtalað í hesum sambandi

**Tú fert millum annað at hava ábyrgdina av at:**
- Marknaðarstrategi bankans verður framd
- Samskipa marknaðarføringsvirksemi
- Leiða og býta arbeiðsuppgávurnar á deildini

Marknaðardeildin er í løtuni mannað við 3 fulltíðarstørvum. Haraftrat eru 17 marknaðarumboð á deildunum.

**Tín profilur**
Vit vænta, at tú hevur kunnleika til marknaðarføring, arbeiðsroyndir og dugir at orða teg í skrift og talu.

Sum persónur hevur tú áræði, ert jalig/ur og útvend/ur. Tú arbeiðir skipað og útgreinandi og megnar at halda høvdið kalt, tá harðast leikar á. Tú hevur persónliga slagkraft, er ein liðspælari og dugir at leggja fram.

Harumframt skalt tú hava hug at arbeiða innan fíggjarvirksemi.

Halt teg framat, um tú hevur áhuga og dirvi.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal sendast til:
Føroya Banki, att. Bjarki Mohr,
Starvsfólkadeildin, Húsagøta 3,
FO-110 Tórshavn
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. mars 2006 kl. 16:00.

**Meira kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Edvard Heen, telefon 31 13 50, lokal 2134, ella edvard.heen@foroyabanki.fo

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo